# HEILSANIR



Eg takki hjartaliga øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu meg og foreldur míni á konfirmatiónsdegnum 1. apríl.
**Sára Mortensen, Hoyvík.**



**Hey góða Hansa.**
Hjartaliga tillukku við 60 ára føðingardegnum, sum var tann 17.
**Heilsan Systir tín lítla.**



**Góði fitti Teitur.**
Hjartaliga tillukku á 8 ára degnum 20. juli, vit elska teg.
**Heilsan mamma, babba og Linda.**



**Góði elskaði sonur.**
Hjartaliga tillukku á 25 ára degnum í dag. Okur ynskja tær alt tað besta.
**Kærar heilsanir mamma og pabba.**



**Hey Anni.**
Her ert tú ung og fitt, nú ert tú bara fitt. Tillukku við degnum.
**Heilsan Charlie Pride.**



**Hey Anni.**
Tillukku við degnum. Takk fyri, at tú altíð ert so góð við meg.
**Heilsan Sonja.**



**Halló Steikin.**
Tillukku við degnum, og takk fyri nógv góð ár saman. Tað er stuttligt at síggja, at tú heldur tær so væl.
**Heilsan Johnny Cash.**



**Hey hey.**
Hjartaliga tillukku við degnum 17. juli. Takk fyri ein ógloymandi túr í Íslandi.
**Ynskja vit øll, Krakkurin, Bambus og Jägermeister.**





**Góði elskaði pabba.**
Eg og mamma vilja ynskja fær hjartaliga tillukku á 25 ára degnum í dag. Alt tað besta.
**Ynskir dóttir tín Súsanna.**



**Hey Anni.**
Tillukku! tillukku! Nú ert tú blivin eitt ár deiligari. Nú mást tú koma niður aftur, tí at vikubløðini hava einki at skriva um.
**Heilsan Fríðrikkur prinsur.**



**Halló liðleiðarin!**
Vit vilja bara siga takk fyri ein fantastiskan túr á Isle of Man. Tú ert bara BEST. Sera undirhaldandi eisini. Tað ber hendan myndin prógv um....Hahahaha.
**Heilsan Gullgenturnar.**



**Hey Anni.**
Nei, tað er annað lívið at ganga á Abbey Road. Tillukku við 20 ára degnum í dag.
**Heilsan Vit, ið ganga aftanfyri.**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ......................................................................
Bústaður: ......................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:

Sosialurin

Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**



# TILTØK

## FØÐINGAR



4. mai fingu Beinta og Regin Hammer, Glostrup, eina dóttur. Hon vigaði 4000 gr. og var 55 cm long. Hon eitur Tóra Reginsdóttir Hammer.

4. juli fingu Ruth og Tordar Dimon, Vági, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3330 gr.

16. juli fingu Eyðbjørg Sólbjørnsdóttir Olsen, Sandi, og Helgi Strøm, Trongisvági, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3080 gr.

17. juli fingu Joan Agnarsdóttir Rasmussen og Eiler Rasmussen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3200 gr.

18. juli fingu Jóna Larsen og Gissur Vestergaard, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3300 gr.

19. juli fingu Málfríð Høj, Strendur, og Jacob Pauli Lamhauge, Rituvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3700 gr.

## ANDLÁT

**12. juli**
Poulina Solmunde í Søldafirði, ættað úr Klaksvík, 79 ár
Hans Jacob Sivertsen, á Argjum, ættaður úr Funningi, 91 ár.

**14. juli**
Pauli Holmsund á Kambsdali, 18 ár.

**16. juli**
Siggert Mikkelsen, múrari, í Tórshavn, 80 ár
Douglas Clothier á Argjum, 80 ár

**17. juli**
Elin Højsted úr Funningi, 72 ár

**18. juli**
Niels Frederiksberg á Strondum, 87 ár
Thomas Wilhelm, vanliga nevndur Tom, fyrrverandi politistur, ættaður úr Vági, 90 ár.
Ella Olsen í Mikladali, 81 ár

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 21. juli: Tormóður Stórá, 444038
Sunnudagin 22. juli: Leif Mosekilde, tlf. 448016

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

### Gudstænastur

*6. sunnudag eftir trinitatis*
Havnar kirkja: Sonja Klein kl. 11, altargongd, skrifamál kl. 10.40 (Talvan gongur fyri sjómansmissiónina)
Kaldbak: Bjarni Bæk kl. 12
Argja kirkja: Bergur d. Joensen kl. 11, altargongd
Kirkjubøur: Bergur D. Joensen kl. 12.30, altarg.
Kvívík: Marjun Bæk kl. 12
Hósvík: Martin R. Jacobsen kl. 11
Hvalvík: Martin R. Jacobsen kl. 12
Vestmanna: Inga P. Dam kl. 11, altargongd
Miðvágur: David Johannesen kl. 11 (Talvan gongur fyri Føroysku Sjómansmissiónina)
Funningur: Emil Olsen kl. 12, messa
Oyndarfjørður: Jógvan Fríðriksson kl. 12, altarg.
Rituvík: Meinhard Bjartalíð kl. 11
Christianskirkjan: Niels P. Danielsen kl. 11, altarg.
Kunoy: Hans Eiler Hammer kl. 12, altarg.
Mikladalur: Peter O. K. Olofson og Silas Olofson kl. 12, familjugudstænasta
Viðareiði: Elsa Funding kl. 11
Hvannasund: Elsa Funding kl. 12.15
Sandur: Jákup R. Hansen kl. 12
Vágur: Ólavur Rasmussen
Fámjin: P. M. Rasmussen

### Hebron, Argir

Møti sunnudag kl. 10.30: Minnismáltíð Harrans. Møti kl. 18 avlýst í summarfrítíðina. Byrjað verður aftur sunnudagin 26. august.
Mikudag kl. 20: Bønar- og uppbyggingarfundur.

### Kirkju- & missiónshúsið á Argjum

Sunnukvøld kl. 17.30: Bønarløta, kl. 18.00 møti við Jóhs. Mortensen og Róa Rasmussen.
heimasíða okkara: www.koma.fo

### Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin í Hoyvíkar skúla: Kl. 17.30: Bøn og kl. 18.00: Møti við ungdómsbólkinum. Øll eru vælkomin.

### Meinigheitshúsið

Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Øssur Kjølbro.
Týskvøldið kl. 20.00: Bíbliutími, Filippibrævið 3. kap. vers 12–21.

### Ebenezer

Sunnudagin:
kl. 10.00: Breyðbróting,
kl. 18.00: Evangeliskt møti
kl. 21.00: Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

### Filadelfia, Landavegur 22

Í dag kl. 17.00: Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 18.00: Kvøldmøti v/ Fríðtór Debes, kl. 22.00: Útimøti v/ Filadelfia.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

### Katólska kirkjan

Hvønn gerandisdag kl. 17.30: Messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11: International Mass – við sálmum á ymiskum málum v/ Martin de Leur í Mariukirkjuni

### Hvítusunnusamkoman

Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 18: Evangeliskt møti.

### Samkoman Immanuel

Sunnudagin kl. 13.00: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 17.00: Møti.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum

Heimasíða okkara: www.koma.fo

### Saron, Vestmanna

Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti við Jógvan Jóhannesen.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bíbil- og bønarmøti.

### Filadelfia, Sundalagið

Sunnukvøldið kl. 18.00: Kvøldmøti. Vestmenningar luttaka.

### Evangeliskt møti í Vík

Sunnukvøldið kl. 19 verður evangeliskt møti í Avhaldshúsinum í Vík. Nógvur sangur og vitnisburður við Tórmund, Jaspur og fleiri

### Útimøti

Heimamissiónin hevur útimøti í Norðagøtu sunnukvøldið kl. 20.

### Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum

Sunnudagin kl. 19.00: Møti v/ Sigfred Johannesen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Ørkin, Saltangará

Evangeliskt møti verður sunnudagin kl. 19.00.
Týskvøldi kl. 20.00 verður húsmøti hjá Maybritt og Trúgva Berg, Søldarfjørður.

### Keldan í Skálafirði

Leygarkvøldið 21. juli kl. 21.00: Opið hús við Arna Abrahamsen og fleiri.
Sunnukvøldið 22. juli kl. 19.00: Møti v/ Jørgen Frants & Hjørdis Jørgensen.
Tú ert vælkomin í Kelduna.

### Soli Deo Gloria

Sunnudagin kl. 18,00 Møti við Andrias Nýggjagarð.
Mánadagin kl. 20.00: Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 6.00: Bøn.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

### Tað fyrigevandi sinnalagið

*Tí at eg sigi tykkum, at um rættvísi tykkara ikki ber av rættvísi teirra skriftlærdu og Farisearanna, koma tit als ikki inn í himmiríkið.*

Matt. 5, 20

Tað sinnalagið, sum svarar til 5. boð, er tað fyrigevandi sinnalagið. Tað, ið ikki søkir egnan rætt og æru, men heldur roynir at skapa frið og semju. Ógjørligt er at gera nágreiniligar reglur fyri hesum, og tað er heldur ikki tað, Jesus ger, tá ið hann í fjallatalu síni nevnir tvey dømi, sum lættliga kunnu koma fyri.

Fyrst sigur hann, at tað hevur størri týdning at verða samdur við bróður sín enn at bera fram gávu á Guðs altar. Tann, ið kennir Jesaja profet, veit, at Guð tekur ikki náðiliga móti gávum, sum blóðdálkaðar hendur rætta honum. Nei, fyrst eitur tað: “Tváið tykkum, reinsið tykkum og fáið illgerðir tykkara burtur frá ásjón míni; lættið av tí illa. Lærið at gera tað góða, leggið dent á tað, sum rætt er, hjálpið neyðstødddum, fremjið rættin hjá faðirloysingum og verjið mál einkjunnar.” (Jes. 1, 16-17)

Hitt seinna dømið hjá Jesusi - at tað er frægari at skunda sær at fáa sátt við mótstøðumann sín, enn at báðir skulu enda fyri dómaranum - finna vit eisini aftur í skriftini. Paulus brikslar Korintmonnum, at teir skulu hava sakarmál hvør við annan: “Hví líða tit ikki heldur órætt? Hví lata tit ikki heldur verða tikið frá tykkum?” spyr hann. (1. Kor. 6, 7) Jesus hugsar óivað uppaftur longur fram, tá ið hann endar sítt lítla dømi við orðunum: “Sanniliga sigi eg tær: Ikki skalt tú sleppa út aftur úr fangahúsinum, fyrr enn tú hevur rindað títt seinasta oyra.” Jesus hugsar um ein annan dómara. Jesus hugsar um eina aðra revsing.

Við at skerpa lógarinnar krøv vil frelsarin læra okkum, at Guðs boð ikki kunnu uppfyllast, men mugu fullførast. Tað ræður ikki um at gera seg lidnan við tey, men at liva í teimum. Ikki fyrr enn vit halda uppat at stríðast móti Guði, ikki fyrr enn vit læra okkum at boyggja vilja okkara inn undir vilja hansara, koma vit at inna sanna rættvísi.

Himmiríkið er Guðs ríki. Tað ríkið, sum við Jesusi er komið okkum nær. Í hesum ríki ræður tann rættvísi, sum verður vunnin við fyrigeving. Jesus vann okkum hana. Eru vit borgarar í hesum ríki, liva vit av Guðs fyrigevandi náði, so verður fyrigeving eisini okkara ynski og mál.

Tú boyggj mítt hjarta, mildi Guð,
at friður valdar sinn’ og hug’,
og ei eg frá tær víki;
tú minn meg á tað hjartalag,
tú bart so mangan dapran dag,
tú minn meg á títt ríki!

**Jákup Reinert Hansen**